## Sampras var keðiligur

Í nýggjari bók leggur fyrrverandi heimsstjørnan í tennis, Andre Agassi, eftir landsmanni og kappingarneyta sínum, Pete Sampras. – Vit kundu ikki verið meira ymiskir. Hann var beinleiðis keðiligur, og eg hevði ynskt, at eg kundi lært av hansara totala mangul upp á inspiratión. Tað nýttist honum snøgt sagt ikki, tí hann vann allíkavæl, sigur Agassi, sum eisini finast at Michael Chang. Hetta tí Chang takkaði Gudi fyri sigurin í French Open í 1989. – Velur Gud kanska síðu, tá hann sær ein tennisdyst?, spyr Agassi.



## Kanna aftur Sir Alex

Enska Fótbóltssambandið boðar enn einaferð frá, at tey ikki vilja finna seg í útsagnunum, sum Sir Alex Ferguson ferð eftir ferð hevur sett fram móti dómarum. Hesa ferð eftir at Fergie geylaði eftir Martin Atkinson, sum dømdi dystin millum Chelsea og Manchester United sunnudagin. – Hann sær jú ikki nakað sum helst, segði Sir Alex um hendingina, tá Chelsea fekk frísparkið, sum førdi til einsamalla málið.



Tomislav Sivic, sum í Føroyum hevur vant VB, B36 og KÍ, sigst nú vera favorittur at fáa starvið sum serbiskur U17-venjari

## Sivic skal møguliga venja U17

**Serbiska fótbóltssambandið skal nú gera av, hvør skal standa á odda fyri U17-landsliðnum, sum næsta ár er vertur fyri EM-endaspælinum. Ein av top-kandidatunum er Tomislav Sivic**




Jákup Mørk

Seinastu trý kappingarárini hevur Tomislav staðið á odda fyri ungverska Kecskeméti , har hann hevur havt sera góð úrslit, og verður hann nýggjur U17-venjari, noyðist hann at siga farvæl til tann sessin.

Í serbisku miðlunum verður sagt, at tað bert er formalia eftir at avgreiða, áðrenn Tomislav verður settur í nýggja starvið, men sjálvur vil Tomislav als ikki vátta hetta.

- Nú fáa vit at síggja. Tað er rætt, at tað er ein møguleiki har, men eg havi framvegis sáttmála við Kecskeméti. Sjálvur eri eg í Egyptalandi og ferðist í løtuni, so eg fái ikki fyrihildið meg til tað, sum verður skrivað í miðlunum. Tað einasta eg veit, er at eg í løtuni havi venjarastarv í Ungarn, sigur Tomislav Sivic.

Kecskeméti er í løtuni á fjórðaftasta plássi í bestu ungeversku deildini. Eitt stig oman fyri niðurflytingarstrikuna.

### KÍF-Neistin 25-23 (10-12):

# Kollfirðingar við av álvara

**Næsta dystin á rað vann KÍF. Hesa ferð móti Neistanum, sum fullkomuliga misti luftina seinasta partin av dystinum**




Jákup Mørk

Eftir at hava verið púrasta sørir fyrstu umførini av kappingini, hava kollfirðingar av álvara reist seg.

Seinasta sunnudag vunnu teir á VÍF, og í gjár koppaðu teir oddaliðnum úr Neistanum, tá hesir hitaðu upp til europiska uppgávu.

Tað var annars ikki so nógv, sum bendi á sensatiónina stóran part av dystinum. Hóast kollfirðingarnir hingu væl í mótstøðuni, so hevði Neistin støðugt munin, og etir megnaðu eisini at svara aftur, tá KÍF nakrar ferðir vann seg upp á javnt í seinna hálvleiki.

Men seinastu sjey minuttirnar gekk heilt galið. Frustratiónir og vantandi konsentratión bóru við sær,a t neyvleikin als ikki var til staðar hjá Neistanum seinastu løtuna, og ein væl spælandi Óla Christian Djurhuus mest sum læsti sítt mál fullkomuliga av.

Samstundis fekk KÍF veruliga ferð á sítt spæl, og við fimm málum á rað komu teir upp á 24-22. Neistin royndi at svara aftur, men tað eydnaðist ikki meira enn næstan, og so varð ringi dagurin staðfestur, tá teir í seinastu løtu misnýttu brotskast. Hetta kundi sum so bara minkað um munin, men talan var um fjórða misnýtta brotskastið á degnum, og tað sigur væl eisini nakað um tákið, sum KÍF-málverjin hevði á bláu skjúttunum á degnum.



Fyrstu umførini gekk illa í hond hjá KÍF. Frøin á beinkinum var øgilig, tá Jan Ottoesen kundi staðfesti, at sigurin var komin til høldar

Mynd: Álvur Haraldsen

**FAKTA**

**KÍF-Neistin 25-23 (10-12)**
**10 min:** 3-5
**20 min:** 5-9
**40 min:** 15-16
**50 min:** 18-20
**Málskjúttar**
**KÍF:** Rógvi Weihe 5, Ási Dam 5(4), Regin Petersen 4, Niklas Reginsson 3(1), Jákup Trygvason 3, Andrias Nielsen 2, Tony Weyhe 2, Bergur Lützen 1
**Neistin:** Jugoslav Djumic 5, Finnur Hansson 5(1), Heini Hanusarson 3, David Edvardsen 3, Sjúrður Thomassen 2, Bigir Poulsen 2, Áki Mørk 2, Karl Odmar Rasmussen 1
**Brotskøst:** KÍF 7, Neistin 5
**Útvísingar:** KÍF 5, Neistin 2
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

### Stjørnan-VB 35-21 (20-6):

# Stjørnan arbeiddi skjótt

**Spennandi varð tað ongan tíð í Klaksvík, tá Stjørnan køvdi VB longu fyrsta korterið**




Jákup Mørk

Unga VB-liðið fekk av álvara sína sak fyri, tá tær sunnudagin møttu einum Stjørnu-liði, sum veruliga skuldi reisa seg eftir tapið móti Tjaldri seinasta vikuskiftið.

Og tað fekk VB at merkja alt fyri eitt. Stjørnan legði fyri sum eitt óløgið, og við góðari ferð á spælinum tóku tær fullkomuliga luftina úr VB-liðnum alt fyri eitt.

Fyrri hálvleikur var mest sum framsýningarhondbóltur hjá Stjørnuni, sum meira ella minni útstillaði munin millum topp og botn í Sunset-deildini, og tað var veruliga ikki nógv, sum VB fekk gjørt fyri at arga mótstøðuna.

Eftir steðgin tók heimaliðið ferðina av spælinum, og VB slapp eisini at spæla við. Menn nakað nær námind spennandi gjørdist tað ikki, hóast VB slapp at pynta nógv um støðuna seinastu løtuna.

**FAKTA**

**Stjørnan-VB 35-21 (20-6)**
**10 min:** 5-2
**20 min:** 13-4
**40 min:** 27-8
**50 min:** 31-15
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Valentina Suciu 11, Joan Midjord Djordjevic 7, Simona Petersen 7(2), Bára Skaale Klakstein 4, Una Olsen 3, Ella Petersen 1, Edith Hansen 1, Diana Poulsen 1
**VB:** Christina Holm 6, Una Egilsdóttir 5(3), Monika Samuelsen 3, Bára K. Mortensen 2, Sára Samuelsen 2, Margreth Augustinussen 1, Theresa Joensen 1, Andrea Nielsen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 3, VB 5
**Útvísingar:** VB 6
**Dómarar:** Birgir Sondum & Thomas J.Thomsen